LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

Løgtingið

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 094/2022 eftir tingskipanini § 52a til Aksel V. Johannesen, løgmann, frá Jacob Vestergaard, løgtingsmanni, um Sandoyartunnilin

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Er ósemja ímillum P/F Eysturoyar- og Sandoyartunnil og arbeiðstakaran NCC um at gera Sandoyartunnilin lidnan?
2. Drálar NCC við at gera Sandoyartunnilin lidnan, og um so er, hvør er orsøkin?
3. Sleppa undirarbeiðstakarar ikki fram at, fyrrenn NCC er liðugt við sítt arbeiði?

Svar:

Fyri at svara spurninginum havi eg vent mær til P/F Eysturoyar- og Sandoyartunnil. Partafelagið upplýsir fylgjandi:

Til spurning 1
Arbeiðið at gera Sandoyartunnilin líður væl og tað er einki, sum bendir á, at tunnilin ikki verður liðugur til sáttmálasettu tíðarfreistina. Tá slík stór arbeiðir verða gjørd, verður nærum altíð samskift aftur og fram um ymiskt. Tað er í løtuni ikki nøkur ósemja um at gera sjálvan tunnilin lidnan.

Til spurning 2
Yvirskipað er sáttmálin millum byggiharran og arbeiðstakaran umfataður av ABF 06(Almindelige Betingelser for arbejder og leverancer i byggeog anlægsvirksomhed), sum nágreinar samstarvið millum partarnar. Vanligt er, at ein slíkur sáttmáli m.a. inniheldur tíðarfreistir fyri nær ymisk arbeiðir skulu vera liðug. Áðrenn hesar tíðarfreistir, er tað arbeiðstakarin, sum hevur allan rætt til at leggja til rættis síni arbeiðir, og nær teir ymisku staklutirnir verða gjørdir. Byggiharranum kunnugt, er tað ikki nakað, sum bendir á, at umrøddi arbeiðstakari ikki klárar at halda sínar tíðarfreistir smb. sáttmálanum.

Til spurning 3
Undirarbeiðstakarar hava verið inni í Sandoyartunlinum og gjørt ymisk arbeiðir eftir avtalu við høvuðsarbeiðstakaran. Ætlandi fara teir aftur í tunnilin at arbeiða, tá arbeiði hjá høvuðsarbeiðstakaranum er komið longri. Í løtuni riggar tann eini undirarbeiðstakarin seg til uttanfyri tunnilin á Gomlurætt, og annars framleiðir og testar útgerðina, sum skal inn í tunnilin.

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

Í Tinganesi, 22. mai 2023

Aksel V. Johannesen
løgmaður

Tinganes - Fo-100 Tórshavn – Faroes
Tel: (+298)306000 – e-mail: info@tinganes.fo - www.lms.fo